# Týskt í serstøðu sum fremmandamál og vallærugrein

Útsagnir sum „Tú kanst ikki brúka týskt til nakað“ fella fækkandi talinum av næmingum, sum enn velja týskt í fólkaskúlanum, javnan fyri oyrað. Í staðin fyri at fara til týskt kundu tey farið við hinum ein túr í SMS og sovið longur um morgunin. Umframt fakliga motivatión at velja týskt krevst nú eisini persónlig styrki at vera øðrvísi enn tey flestu í fólkaskúlanum.

**Tekstur:** Maria Heradóttir

Hurðin gongur, og heim kemur Røskva úr skúla. Hon setur taskuna frá sær, og meðan hon letur seg úr jakkanum, rópar hon innar: „Mamma, nú eru vit liðug við bókina í týskum. Nú er bara mállæra, uppgávur og endurtøka. Tað er mega stuttligt!“

Røskva hoyrir til minnilutan. Bilsin svari eg: „Eru tit longu liðug við bókina?“ Hetta er fyrsta árið, hon lærir týskt, og satt at siga øtist eg, hvussu nógv tey longu hava lært. Flokkurin man vera serligur, so skjótt sum hann tekur seg fram, hugsi eg, sum sjálv havi royndir sum lærari í týskum á miðnámi. Ella er hetta kanska tað, tú veruliga kanst vænta av einum 8. flokki? Gaman í eru mínar royndir við byrjanartýskum á miðnámi avmarkaðar, tí tá var ikki vanligt at hava týskt á byrjanarstigi.

Fyri mær er tó ein týðiligur munur. Næmingarnir í 8. flokki hava longu fingið væl meiri burturúr, enn flest allir næmingar í byrjanartýskum á miðnámi høvdu eftir so stutta tíð. Áhugavert, men kanska ikki so løgið kortini, tí fortreytir hava nógv at siga. Mínir næmingar á miðnámi høvdu ikki somu royndir at dúva uppá, sum næmingarnir í 8. flokki, tí fyri flestu teirra vóru fleiri ár fráliðin, síðan tey seinast byrjaðu eitt fremmandamál. Harafturat vóru nógv teirra eisini munandi eldri enn tey í 8. flokki.

Men lat meg nú ikki gera miðnámsskúlanæmingum órætt. Tey 14 árini eg undirvísti, høvdu flestu teirra hóast alt minst tvey ára forkunnleika í týskum og málsligar royndir, sum tey bygdu víðari á næstu tvey trý árini. Somu næmingar høvdu góðar fortreytir at menna sínar førleikar til eitt støði, sum gjørdi tey sjálvstøðug bæði á skrift og í tal, um tey løgdu í.

Hatta var tá, men soleiðis nýtist ikki at vera longur. Við nýggju skipanini hava næmingar fingið fleiri valmøguleikar – eisini at velja frá. Fakliga hava tey framvegis nógv at vinna, um tey velja týskt í fólkaskúlanum, tí soleiðis menna og viðlíkahalda tey sínar málsligu førleikar, samstundis sum beinleiðis framhald á miðnámi er møguligt á hægri stigi enn øll byrjanarmál. Týskt í fólkaskúlanum hevur so statt stóran týdning fyri málsliga førningin og harvið eisini fyri støðið í øllum málsligum lærugreinum. Men týskt er ikki longur kravd lærugrein og heldur ikki upptøkukrav til miðnám. Sama er við alis- og evnafrøði, sum hinvegin er upptøkukrav til náttúru-, tøkni- og tilfeingisbreytina. Hesin munur sæst aftur í misjøvnu undirtøkuni, sum hesar lærugreinar fáa í fólkaskúlanum. Á miðnámi er týskt einasta fremmandamál, sum hevur status bæði sum byrjanar- og framhaldsmál, tí tað er lærugrein í fólkaskúlanum eisini. Kortini ger tað ongan mun fyri endaliga prógvið, um tú tekur tað hægra ella tað lægra endaliga stigið, tí næmingar vinna tekniskt sæð einki á miðnámi, um tey høvdu týskt í fólkaskúlanum ella ikki. Allir miðnámsskúlar bjóða heldur ikki týskt á báðum stigum og onkur als ikki.

Skúlaskipanin hevur longu elvt til eina niðurlaðing av fremmandamálum undantikið í enskum. Enskt frá 4. flokki er seinasta kravda málið í fólkaskúlanum, meðan bert hugbreytin á miðnámi krevur enn eitt fremmandamál. Í øðrum førum er nóg mikið við bert føroyskum og enskum sum eitt minsta krav til eitt studentsprógv. Heldur gongdin fram, er vandi fyri, at týskt fer eisini at enda sum byrjanarmál á miðnámi. Hendir tað, fara eingir næmingar í sama mun sum fyrr at hava ein málsligan førning við sær longur. Skipanin leggur eisini upp til, at tú kanst enda eitt mál eftir bert tveimum árum, sum sjáldan er nóg mikið at gerast førur fyri at brúka málið sjálvstøðugt. Harumframt eru avmarkingar í teimum „pakkaloysnum“, sum onkur miðnámsskúli bjóðar, sum kunnu gera tað torført at velja meir enn eitt fremmandamál. Útlitini eru, at vit fara at duga færri mál á einum lægri stigi undantikið í enskum.

Vit síggja eisini eina niðurraðfesting av týskum í fleiri fólkaskúlum. Skúlaleiðslur vilja sjálvsagt røkka sum longst og spara sum mest fyri at fáa kabaluna við vallærugreinum at ganga upp við tilboðum til allar næmingar. Fíggjarkarmurin loyvir ikki øllum valmøguleikunum framat, og tí noyðast skúlaleiðslur at raðfesta. Sum er skal undirvísing verða í alis- og evnafrøði og týskum, um næmingar velja hesar lærugreinar. Eru tey fá í tali, fáa tey kortini framíhjárætt, meðan lærugreinar við stórari undirtøku í ringasta føri mugu lúta fyri minnilutanum. Avleiðingin er ein innanhýsis kannibalisma millum valfakini, har ein lærugrein køvir aðra fyri at vinna fram. Gongdin er niðurbrótandi fyri allan skúlamoral. Dømi um hetta eru lærarar, foreldur og næmingar, sum venda sær ímóti týskum, tí lærugreinin tekur frá hinum, og skúlar, sum strika týskt av tímatalvuni, leggja tímarnar saman seint á degi, ella leggja annað virksemi samstundis. Avleiðingin er næmingafráfall, avlýstir tímar og valið ímillum hetta ella hatta men ikki bæði.


Maria Heradóttir, ritstjóri

Trupulleikin við vallærugreinaskipani steðgar tó ikki her, tí velur tú aðrar lærugreinar enn týskt og alis- og evnafrøði, veitir skipanin tær kortini onga trygd fyri, at tú kemur á mál. Fer fráfallið upp um eitt vist, verður lærugreinin niðurløgd. Kanska hetta er ein orsøkin til, at skúlar bjóða lærugreinar, sum ikki eru próvtøkufak ella í samsvari við námsætlanina fyri á tann hátt halda næmingum til, hóast tilboðið kann verða avlagandi fyri hinar vallærugreinarnar.

Hvussu enn víkur ella vendir, verður Røskva ikki tann, sum hoppar frá. Hon fær sum mest burtur úr teimum skúlatilboðum, ið standa henni í boði, og verður neyvan fyri vanbýti av skipanini. Felags fyri nógvar næmingar er tó, at tey hoyra eini skipan og harvið mentan til, sum sáar iva um týdningin at læra týskt. Skal vend koma í, mugu vit viðurkenna tey viðurskifti, sum eru atvold til, at týskt er komið í eina so serliga støðu. Grundleggjandi spurningurin er, um vit vilja týskt ella ikki, tí vilja vit tað, má lærugreinin fáa innivist uttan at taka frá øðrum vallærugreinum. At byrja tíðliga og enda á hægsta stigi átti somuleiðis at fingið viðurkenning.

Hví læra týskt? Les á:
**snar.fo/folkaskuli/tyskt**